FALDARI 3

# H71

2017 2018

## HEIMA Í HOYVÍK



**HOYVÍKSHØLLIN** SUNNUDAGIN **19. NOVEMBER** 2017

hvonn KAPPINGIN **H71 v NEISTIN** KL. 14.30

FTZ KAPPINGIN **H71 v NEISTIN** KL. 16.00


Auto Service
BONUS er billigari!
J&K
TRYGD
INTERSPORT Thomas Dam ítróttur
ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
LAIDERZ
SUÐUROYAR SPARIKASSI



# TEY BLÁU VITJA Í HOYVÍK

So er aftur dupultdystur á skránni. Hesaferð skulu vit møta Neistanum í Hvonn og FTZ deildini á heimavøll í Hoyvík. Seinast vit møttu Neistanum í dupultdysti, var í høllini á Hálsi fyrr í kappingini. Tá hilnaðist serliga væl hjá Hvonn liðinum, ja so væl, at vit neyvan tora at vóna, at líka væl spælir av nú í Hoyvíkshøllini. Sum kunnugt vann unga orkuríka Hvonn lið okkara tá á sigursvandu kvinnunum úr Neistanum, eitt bragd, ið verður trupult at endurtaka. Í FTZ deildini leiktu vit javnleik, eftir at hava haft eina trygga leiðslu á 3 mál stutt fyri leiklok. Tann sigurin var at kalla blakaður burtur. Í dag skulu vit tó lata væl at, fáa vit javnleik í FTZ deildini. FTZ liðið hjá Neistanum er sera væl leikandi í løtuni og liggur uppiborið á odda í deildini. FTZ liðið hjá okkum er hinvegin í einum aldudali, eftir at hava verið fyri lemjandi ósigri ímóti VÍF í Vestmanna, har vit taptu við kuravbóltasiffrunum 36 – 25. Ja, sigast má, at stílur er yvir H71 - eisini tá vit tapa.

Í FTZ deildini hava vit verið darvaðir av skaðum. Soleiðis hava Hilmar Leon, Niclas og Johan Hofgaard sitið uttanfyri við stutttíðar

***...framhald á síðu 4***



**Anna Dam** forkvinna, tel. 519082


**Eyðun Joensen** tel. 792640


**Ann-Mari B. Mouritsen** tel. 214452


**Emy Sólvitsdóttir** tel. 513769


**René Dahl Olesen** tel. 235930


**Janet Fríða Johannesen** tel. 212211


**Símun Poulsen** tel. 517220


**Erland Jensen** tel. 243534

**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo



NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Erland Jensen
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent



**Ungdómsbankin**

# Hetta er tað, sum telur

BANK**NORDIK**

**LØTAN. VINIRNIR. LÍVIÐ.**

Vit hugsa um teg, tína støðu og títt lív. Lat okkum hjálpa tær við teimum turru og praktisku tingunum, so tú kanst brúka tíðina til tað, sum hevur týdning fyri teg.

**www.banknordik.fo/ungdomsbankin**

*Meira enn ein banki*



skaðum og Bogi Davidsen við langtíðarskaða. Vanliga hava skaðar ikki darva okkum, sjálvt hjá stuðulsleikarum. Leikarahópurin hevur verið so mikið breiður, at menn eru komnir í mans stað. So hevur tó ikki verið í ár. Hópurin er nakað smalari enn undanfarin ár. Men hugaligt er at síggja nýggjar menn taka við avbjóðingum. Arbeiðast má alla tíðina við at seta nýtt fólk við, annars steðga vit upp. Og higartil hava allir tikið av teimum avbjóðingum teir hava fingið, og tað er at frøast um. Her kann vera lagt afturat, at ein hevur varhugan av, at Sonne støðugt hevur sær hetta fyri eyga  og støðugt roynir bæði líkar og ólíkar uppstillingar av liðinum í dysti.

Í fyrstu deild hjá monnum, hava vit verið meiri ella minni einaráðandi seinastu mongu árini og hava vunnið deildina nærum á hvørjum ári síðani 2009. At hava ein stinnan og breiðan hóp í 1. deild er eisini avgerandi. Hetta eru flest allir leikarar, ið banka uppá til FTZ hópin og skal henda "næst fremsta " rekja av leikarum tí takast í álvara og vera sterk. Lið okkara í fyrstu deild kom tó ikki so væl frá byrjan og tapti tríggjar teir fyrstu dystirnar. Síðani hevur tó gingið betur og hevur liðið vunnið fýra teir seinastu dystirnar á rað. Liðið tikist soleiðis at vera um at finna stevið og er tað at frøast um.

Hvonn lið okkara má tó sigast at halda áfram í kappingini, á sama hátt sum byrjað varð. Spælt verður við fullari ferð, óimponerað og har allir leikarar bjóða inn. Tað er ikki ein av ungu Hvonn-leikarum okkara, ið hevur leikt alibi hondbólt, hóast hetta er fyrstu ferð at vit royna okkum á so høgum støði. Og tað er alt avgerandi. Á tann hátt gerast leikararnir betur og royndari í deildini. Tað síggjast eisini longu nú risa fet frameftir í leikinum hjá Hvonn liðinum. Taka vit dystin seinasta vikuskifti ímóti VB sum dømi, so høvdu vit stóran part av dystinum VB á knøunum og við einum eitt sindur hepnari enda á dystinum, høvdu vit vunnið. Í støðuni 22 – 20 kiksaði tó hjá okkum og vit máttu lata okkum eitt tap á 23 – 26 linda. Spell, men flott og hugaligt at síggja, hvussu nógv liðið hevur tikið seg fram hesar fáu dystir leiktir eru higartil í ár.





XL BYG®
TÓRSHAVN
TIMBURHANDIL - BYGGIMARKNAÐUR
og nú eisini
XL BYG®
HANDVERKARABÚÐ
Opið
Mán - frí 08.00 - 17.00
Leygard. 09.00 - 13.00


Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
SENDISTOVAN
Trygg
fíggjarstýring
nema

Tað besta omanå
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj
vøra!
SENDISTOVAN
m3m

javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger

Kaj Andreasen & Co
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum



TIT HAVA TØRVIN
VIT ERU VEITARIN.
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco




Dekk
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
- sjálvandi frá Bilrøkt!
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo


LEASA MEG
PRIVAT LEASING FRA REYNI SERVICE
TOYOTA
3
ÁRA SERVICE PAKKI
YARIS HYBRID
YARIS HYBRID
Einans 3.640,- um mánaðin!
TØRVAR IKKI LØÐING
Við Yaris all in fært tú alt við: Tá er eisini trygging, vektgjald og dekk íroknað. Allir prísir eru við mvg. Eitt stovningargjald á 20.000 kr., eitt fast mánaðargjald og nýggjan bil 3. hvørt ár. Og vit taka okkum av øllum viðlíkahaldi. Sí treytir á reyniservice.fo
REYNI SERVICE
Umhvørvisviðurkent ISO 14001 virki

vistir.fo
haraldsen



trygging.fo



# Tryggja **teg** og **tíni kæru**

Tað er týdningarmikið at tryggja teg og tíni kæru, um tú skuldi verið fyri vanlukku ella sjúku.





Ein **vanlukkutrygging** fevnir um flestar vanlukkur, skaðar og óhapp, sum tú kanst koma út fyri. Til dømis dekkar hon ymisk sløg av tannskaðum og øðrum likamsskaðum, men tilburðurin skal vera íkomin í samband við ein vanlukkutilburð.

**Viðgerðartrygging** er góð og er galdandi alt samdøgrið, bæði tá ið tú ert til arbeiðis og tá ið tú hevur frí. Hon fevnir um pínu, sjúku og fylgjur av vanlukkum, sum krevja viðgerð av serlækna. Hon tryggjar tær viðgerð innan 10 dagar, soleiðis at tú sleppur undan bíðilistum.

**Set teg í samband við okkum og hoyr meira um hesar og aðrar tryggingar.**

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR




# Ætlar tú at selja tíni hús í Hoyvík ?

# - vit hava keyparar, ið bíða

Niels F[illegible]a 37 | Tórshavn | Tel 348 900 | inni@inni.fo | inni.fo

INNI


VIT HAVA ALLA
ÚTGERÐ TIL
HONDBÓLT
adidas
H71 Sweat
Børn: 399-
Vaksin: 449,-
INTERSPORT
Thomas Dam ítróttur


BANK NORDIK
H71

# VENJARA-FRÁGREIÐING G12

Venjingarnar hjá gentum 12 ár í H71 kappingarárið 2017-18 byrjaðu miðskeiðis í august mánað. Orsakað av hallarumbyggingunum í kommununi var byrjanin eitt sindur fløkjaslig, og venjingarskráin umskiftilig. Men nevndini hjá felagnum at takka, fingu vit sett saman eitt nøktandi tilboð, við trimum hallarvenjingum og einari styrkivenjing, har tann eina hallarvenjingin er saman við yngra G14 aldursbólkinum. Orsaka av fótbólti og øðrum greinum var uppmøtingin skiftandi fyrstu tíðina, men nú møta genturnar sera væl upp.

Vit venja tíðliga mánadag, týsdag og fríggjadag hondbólt í høllini, og mikudag venja vit styrki við Alec í fimleikahøllini í Hoyvíkar skúla.

Tað eru 28 gentur tilmeldaðar í G12, harav fimm eru byrjaðar í ár. G12 deildin er í ár manna við gentum, sum eru føddar í 2005 og 2006. Ymiskt er á hvørjum menningarstigi genturnar eru á, so venjingin skal fevna breitt. Vit hava tvey lið við í landskappingini. Eitt í A-bólkinum og eitt í B-bólkinum. Tær eldru spæla á a-liðnum, meðan tær yngru og tær eldru, sum júst eru byrjaðar, spæla við b-liðnum.

Vit royna at byggja venjingina á tilmælini í føroyska leistinum, sum Dia Midjord og Birgir Hansen hava gjørt. Tvs. at vit hava áherðslu á førleikarnir hjá tí einstaka, ein ímóti einum. Vit venja eisini nakað av metingarspæli, har leikarin skal venja síni evni at taka røttu avgerðina. Tað er umráðandi fyri okkum, at leikarin sleppur at royna seg á ymsum plássum, men venjingar skulu eisini vera fyri einstøku plássini. Vit eggja gentunum at verja frammaliga uttan nógvar bindingar, men venja eisini meira grundleggjandi verjuspæl. Vit venja sum so ongar fastar álopsskipanir, men ístaðin venja vit ein ímóti einum førleikar og metingarspæl. Tó arbeiða vit nógv við yvirgongum, tí tað kann víðka sjónarringin hjá fleiri leikarum. Nakað av styrkivenjing og samskipanarvenjing er fastur partur í hallarvenjingini, men samstundis venja genturnar styrki og smidleika burturav eina fer um vikuna.

***...framhald á síðu 16***






Vit royna at skapa gleði og trivna í venjingini, men samstundis ynskja vit at leikararnir eru neyvir og hugagóðir í venjingini, møta væl upp og eru klárar til venjingina.

Størsta avbjóðingin er at røkka øllum har tær eru, tí menningarstigið tekniskt, taktiskt og kropsliga er so ymiskt. Tað krevur at vit eru fleiri venjarar. Hallur Danielsen er høvuðsvenjari, men hvønn fríggjadag stendur Rói Joensen fyri venjingini. Tá royna vit at deila upp í tveir bólkar, alt eftir menningarstigi, seinna partin av venjingini. Mánadag og týsdag er Maria Halsdóttir Weyhe hjálparvenjari, meðan Silja Sámalsdóttir hjálpir til týsdag.

Til kappingarnar hevur tað gingið toluliga væl higartil í ár. Vit vóru við tveimum liðum til Night Cup í Vestmanna. Genturnar stuttleikaðu sær óført. A-liðið tapti hálvfinaluna móti StÍF, sum vann kappingina. B-liðið stríddist væl, og høvdu eina lærurika kapping. Til Heystkappingina hjá HSF høvdu vit somuleiðis tvey lið við. A-liðið vann A-kappingina við finalusigri á StÍF, meðan b-liðið tapti B-finaluna tepurt fyri Søljuni.

Nú eru landskappingin og steypakappingin byrjaðar, og bæði liðini hava fingið eina góða byrjan.

Eitt er skipaða venjingin í høll og dystirnir í vikuskiftinum, men veruleikin er, at tað er umráðandi, um leikararnir veruliga ynskja at gerast dugnaligir hondbóltsleikarar, at tær eru nógv meira virknir enn bara til venjing. Tí er tað sera gleðiligt, at nógvar íðka annan ítrótt eisini. T.d fimleik, hondbólt, svimjing o.a. Eisini síggja vit fleiri og fleiri gentur í høllini aðrar tíðir. M.a tá liðini hjá H71 í FTZ- og hvonndeildini spæla dyst. Tá spæla tær, saman við øðrum børnum, hondbólt áðrenn, í steðginum og aftaná, og tað er sera mennandi.

Alt í alt er gongdin hjá G12 í H71 toluliga góð.

Vinarliga

Venjararnir



# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**



Vit hava deilt vinningin millum
allar kundar okkara í 50 ár
– og tí halda vit fram við

Kopargøta 1, Tórshavn | www.liv.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN



# Góðir starvsfelagar skapa góð úrslit

"Eg eri vísur í, at tað er góði starvsandin, sum skapar góðu úrslitini hjá Marine Harvest"

*Fjalar, alari í Oyndarfirði*

Marine Harvest strembar eftir at skapa bestu liviumstøður fyri laksin. Vit tryggja okkum, at laksurin er heilsugóður matur. Vit arbeiða í góðum samljóði við umhvørvið og við ábyrgd fyri samfelagnum. Marine Harvest vil vísa vegin til alsamt størri burðardygd.

LAIDERZ

*Better in the long run*






VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI
Alt til
HITA
SANITET &
VENTILATIÓN
Maria Poulsen & Co
Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000


w.kondi.dk
FAXE
KONDI
MED DRUESUKKE


Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
PRIMA
frá
p/f Sveisingahandilin
Myklnesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909



...bert hugflogið
setur mørk!

OKKARA NÝGGJA SKERIMASKINA

# HUGSA STÓRT

Við nýggju skerimaskinu okkara kunnu vit nú bjóða hesa slóðbrótandi framleiðslu í Føroyum.
Útskorin skelti, stavir, samansetingar og standarar úr flest øllum tilfari og tjúgdum.

**Ja, nú ber veruliga ALT til – Hugsa stórt, hugsa Føroyaprent!**

Ring tel. 314555 og hoyr nærri
www.foroyaprent.fo

Føroyaprent



www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

# H71 TIL ARBEIÐIS







At reka eitt hondbóltsfelag sum H71 krevur nógva orku og eisini nakað av peningi. Limatalið veksur støðugt og harvið kravið um fleiri og betri venjarar og betri venjingarumstøður. Hondbóltsfeløgini fáa ongan almennen stuðul og ei heldur stuðul frá altjóða hondbóltssamgongum. Tískil skal hvør króna sum krevst fáast til vega við limagjaldi, tiltøkum og lýsingarstuðli. Hóast H71 hevur nógvar góðar og trúgvar stuðlar, og hóast fólk eru røsk at gjalda limagjald, so má felagið allatíð verða tilreiðar at átaka sær uppgávur sum geva pengar í kassan.

Farna vikuskifti var gott dømi um hvat krevst av okkara limun, foreldrum, nevndar- og ábyrgdarfólki annars. Meðan flestu av okkara barna og ungdómsliðum spældu kring landið, vóru okkara Hvonn og FTZ leikarar til arbeiðis tá nýggi POWER handilinum lat upp. Kvinnurnar leiðbeindi kundum og okkara ungu menn avgreiddu vøruútflyggjan frá kl. 10 til 22. Samstundis var TOMBOLA í SMS har okkara ungu gentur og dreingir eisini arbeiddu, og í Hoyvík vóru onnur foreldur, ið skipaðu fyri kaffisølu í sambandi við kapping, meðan aðrir leikarar dømdu og sótu við dómaraborðið. Alt í alt hugsi eg, at uml. 100 fólk vóru til arbeiðis fyri H71 hendan leygardagin og hvat er tað ikki hugaligt at verða forkvinna í felagið sum hesum, har so nógv vilja geva burtur av tí sum vit hava minst av nevnliga TÍÐ



Takk fyri stuðulin

# FLØSKU INNSAVNAN

## 28. NOVEMBER

## KL.17.00

H71 kemur eftir ætlan runt í húsini í Hoyvík týsdagin 28. november 2017 eftir kl.17.00. Um tit hava fløskur at lata, so taka vit fegin ímóti teimum.

H71

Loysnir tel 214452

# FOKUS 18:29

## Lætt og stuttligt



### Ger tínar dreymar til veruleika

- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á - NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

**Gjaldskort** **Netbanki** **Fígging** **FramtíðarKonta**

Vitja okkum í Vági og Havn.

**ss.fo**

SUÐUROYAR SPARIKASSI

ANNIJANNI



# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.

Óla Jákup Kristoffersen, adv.

Christian Andreasen, adv.

Niels Winther Poulsen, adv.

Helga á Borg, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN

TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt sunt og gott
www.fast.fo
fast:


SEX
KREVUR
SAMTYKKI!




NORÐOYA SPARIKASSI

Orkulán 2,5%

- Bústaðarlán við lágari rentu

***Bílegg eitt kundaprát***
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkuláninum*



*Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo*

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum skatti

Afturrindan av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

FAROE SHIP

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

samskip
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com


SKORA
VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór


FÖROYA BJÓR Í HOYVÍK
Karlamagnusarbreyt 17
OPIÐ
Hósdag kl. 10.00 – 18.00
Fríggjadag kl. 10.00 – 19.00
Leygardag kl. 10.00 – 16.00

## H71

**1** Ári E. **Dam**
**12** Jóhan **Hofgaard**
**16** Jens **á Skipagøtu**

**3** Mark **L. Marcher**
**4** Rúni **Vest Højgaard**
**5** Rani **Højgaard**
**6** Leivur **Mortensen**
**7** Esbern **Patursson**
**8** Pætur **Thomsen**
**9** Bergur **Ákason**
**10** Vilhelm **Poulsen**
**11** Hans Kári **Hansen**
**14** Sigmundur **H. Dahl**
**15** Sigmundur **Nolsø**
**17** Poul Símun **í Garði**
**18** Andor **Sivertsen**
**24** Niklas **Højgaard Hanusson**
**26** Boas **Heinesen**
**27** Hilmar Leon **Jakobsen**

**Venjari:** Sonni D. V. Larsen
**Málmansvenjari:** Jens á Skipagøtu
**Styrkivenjari:** Heri Ziska
**Liðleiðari:** Petur Sivertsen
**Fysioterapeutur:** Bartal Dahl Andreassen
**Upptøkur:** Hanus Højgaard

## Neistin

**12** Eliesar **Rubeksen**
**16** Nicolas **Satchwell**

**2** Carl Herup **Olsen**
**3** Karl Martin **Olsen**
**4** Pól **Niclassen**
**5** Pætur **Mikkjalsson**
**6** Høgni **Qachariassen**
**7** Djóni **Højggard**
**10** Kristjan **Dulavík**
**17** Tróndur **Kragesten**
**21** Jónsvein **Dulavík**
**29** Tordil **Hentze**
**30** Rasmus **Søby**
**33** Rune **Olsen**

**Bonkurin:** Jeppe Borch, Áki Mørk, Guðrun Patursson, Andrias Nielsen

## Dystaryvirlit hjá H71 í FTZ-deildini:

| | | |
|---|---|---|
| 16.09.2017 | Team Klaksvík - **H71** | 25-**30** |
| 21.09.2017 | **H71** - VÍF | **27**-20 |
| 24.09.2017 | **H71** - Kyndil | **29**-25 |
| 11.10.2017 | Neistin - **H71** | 20-**20** |
| 15.10.2017 | **H71** - KÍF | **31**-26 |
| 22.10.2017 | StÍF - **H71** | 26-**26** |
| 02.11.2017 | VÍF - **H71** | 36-**25** |
| 05.11.2017 | **H71** - Team Klaksvík | **24**-20 |
| 14.11.2017 | Kyndil - **H71** | 24-**28** |
| 19.11.2017 | **H71** - Neistin | |
| 29.11.2017 | KÍF - **H71** | |
| 03.12.2017 | **H71** - StÍF | |
| 10.12.2017 | **H71** - Team Klaksvík | |
| 16.12.2017 | **H71** - VÍF | |
| 06.01.2018 | Kyndil - **H71** | |
| 28.02.2018 | **H71** - KÍF | |
| 04.03.2018 | StÍF - **H71** | |
| 07.03.2018 | VÍF - **H71** | |
| 10.03.2018 | Team Klaksvík - **H71** | |
| 17.03.2018 | **H71** - Kyndil | |
| 25.03.2018 | Neistin - **H71** | |
| 31.03.2018 | **H71** - Neistin | |
| 08.04.2018 | KÍF - **H71** | |
| 14.04.2018 | **H71** - StÍF | |

## Støðan í FTZ-deildini:

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | **Neistin** | **9** | **228** | **194** | **34** | **15** |
| 2 | H71 | 9 | 240 | 222 | 18 | 14 |
| 3 | VÍF | 7 | 207 | 196 | 11 | 8 |
| 4 | Kyndil | 9 | 212 | 211 | 1 | 8 |
| 5 | Team Klaksvík | 9 | 202 | 225 | -23 | 8 |
| 6 | StÍF | 8 | 200 | 215 | -15 | 5 |
| 7 | KÍF | 7 | 169 | 195 | -26 | 0 |

## H71

1 Annika **F. Petersen**
12 Vár **H. Thomsen**

2 Karin **Simonsen**
3 Silja **Sámalsdóttir**
4 Anna **á Steig**
5 Sunniva **Vatnsdal**
6 Karin **R. Dam**
7 Maria **H. Weyhe**
8 Fía **Ey. Hoydal**
10 Ása **K. Hansen**
11 Durita **T. Joensen**
13 Sanna **S. Gunnarstein**
14 Sadie **S. V. Niclasen**
15 Maria **Ingolfsdóttir**
16 Katrin **V. Højsted**
18 Eva **Barba Arge**

**Venjari:** Sonni D. V. Larsen
**Hjálparvenjarar:** Petur Martin Johansen
**Liðleiðari:** Sámal Paulason
**Upptøkur:** Anton Arge

## Neistin

1 Margit **Weihe**
12 Mona Dam **Poulsen**

3 Fríða **á Dunga**
4 Nicoletta **R. Hansen**
5 Eir **Berg**
6 Ása Dam **á Neystabø**
7 Finngerð **Jensen**
8 Drós **Ragnarsdóttir**
9 Stina **Madsen**
10 Marjun **F. Danberg**
14 Daniella **Joensen**
15 Ingunn Kristina **Person**
17 Tórhalla **Thorsteinsson**
18 Hjørdis **Viðstein**

**Bonkurin:** Birgir Hansen, Eirikur Magnussen

## Dystaryvirlit hjá H71 í Hvonn-deildini:

| | | |
|---|---|---|
| 17.09.2017 | VB - **H71** | 27-**23** |
| 21.09.2017 | **H71** - VÍF | **23**-28 |
| 24.09.2017 | **H71** - Kyndil | **18**-27 |
| 11.10.2017 | Neistin - **H71** | 21-**23** |
| 15.10.2017 | **H71** - Stjørnan | **25**-22 |
| 22.10.2017 | StÍF - **H71** | 10-**17** |
| 02.11.2017 | VÍF - **H71** | 40-**24** |
| 05.11.2017 | **H71** - VB | **23**-26 |
| 14.11.2017 | Kyndil - **H71** | 29-**22** |
| 19.11.2017 | **H71** - Neistin | |
| 30.11.2017 | Stjørnan - **H71** | |
| 03.12.2017 | **H71** - StÍF | |
| 10.12.2017 | **H71** - VB | |
| 16.12.2017 | **H71** - VÍF | |
| 06.01.2018 | Kyndil - **H71** | |
| 13.01.2018 | Neistin - **H71** | |
| 28.02.2018 | **H71** - Stjørnan | |
| 04.03.2018 | StÍF - **H71** | |
| 07.03.2018 | VÍF - **H71** | |
| 11.03.2018 | VB - **H71** | |
| 17.03.2018 | **H71** - Kyndil | |
| 31.03.2018 | **H71** - Neistin | |
| 07.04.2018 | Stjørnan - **H71** | |
| 14.04.2018 | **H71** - StÍF | |

## Støðan í Hvonn-deildini:

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 8 | 246 | 175 | 71 | 15 |
| 2 | Kyndil | 9 | 235 | 177 | 58 | 14 |
| 3 | VB | 9 | 239 | 187 | 52 | 14 |
| 4 | Neistin | 9 | 215 | 200 | 15 | 9 |
| **5** | **H71** | **9** | **198** | **230** | **-32** | **6** |
| 6 | Stjørnan | 8 | 171 | 215 | -44 | 2 |
| 7 | StÍF | 8 | 107 | 227 | -120 | 0 |




**Tryggja teg við Vanlukku- og Viðgerðartrygging**

Ein vanlukkutrygging fevnir um flestar vanlukkur, skaðar og óhapp, sum tú kanst koma út fyri.

Viðgerðartrygging er galdandi alt samdøgrið og tryggjar tær viðgerð innan 10 dagar, m.a. er hon galdandi fyri viðgerð hjá fyrisoterapeuti, kiropraktori o.a., um lækni hevur ávíst.

Les meira á betri.fo

betri